# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# MAKRELUR SKAPTI SAMGONGU

Tað ljóðaði fyrr í vikuni, at sokallaða makrelsamgongan var í vanda, tí at Kaj Leo Johannesen ætlaði at seta Johan Dahl sum landsstýrismann í fiskivinnumálum.

Tó at Tjóðveldi ikki alment hevur boðað frá, at flokkurin ikki vil góðtaka Johan Dahl sum fiskimálaráðharra, so hevur næstformaður floksins beinleiðis sagt tað. Men tað sum tykist enn meira løgið er, at eini boð, sum Kaj Leo Johannesen sendir til tingfólk síni á kvøldi, longu klokkan sjey morgunin eftir eru almenn í útvarpi. Tað vil siga, at Kaj Leo Johannesen hevur onkran svíkjara í flokkinum – at hann ikki hevur tamarhald á tingbólkinum, at floksdisiplinin ikki er í lagi. Ikki tí, soleiðis er skilið í øllum flokkum.

Men tað sum annars er farið fram, síðani Fólkaflokkurin fór úr samgonguni, er rættiliga áhugavert. Tað er tekin um, at politikararnir hava lært nakað, at løgmaður og landsstýrið í heila tikið framvegis sita við valdið. Fyri bara fáum árum síðani hevði hetta verið heilt óhugsandi, tí vanliga var tað hitt fremsta málið hjá eini andstøðu fyri alt í verðini at fáa sitandi samgongu frá, kosta hvat tað kosta vildi. Her hava fleiri flokkar víst virðing, og serliga er tað Tjóðveldi, sum hevur drigið longsta stráið í so máta.

Og tá hetta verður sagt, so verður tað einans hugsað um tað prinsippiella í tí, at tveir samgonguflokkar og ein andstøðuflokkur gera eina langtíðar avtalu – í hesum føri um makrelin – sum skal halda fram um hetta valskeiðið. Hetta ber boð um, at ein nýggjur arbeiðsháttur er við at koma fram í føroyskum politikki, sum bara kann verða gagnligur.

Hinvegin so vísir hendan semja týðuliga, at mótpolanir í tjóðskaparstríðinum, Samband og Tjóðveldi, eru við at nærkast, við Javnaðarflokkinum sum millumliði. Hendan samgongan er ikki roynd áður, men nógv tekin eru í sól og mána um, at hetta verður samgogan eftir valið. Spurningurin er so, hvør skal leiða eina slíka. Í Tjóðveldi eru tey so von við ikki at fáa løgmanssessin, so um Tjóðveldi ikki verður mun-



andi størri enn Sambandsflokkurin, so má flokkurin – *traditionen tro* – finna seg í aftur at verða forbígingin. Tað var helst Fólkaflokkurin sum tryggjaði Kaj Leo Johannesen løgmanssessin í 2008 – fyri at revsa Jóannes Eidesgaard.

Soleiðis kunnu vit rokna við, at Kaj Leo Johannesen heldur fram sum løgmaður, meðan Javnaðarflokkurin og Tjóðveldi býta tey tungu málsøkini.

Høvuðsmálið hjá hesi samgongu má so vera grundleggjandi broytingar og langtíðarplanlegging, meðan tjóðskaparmálið – sum tað plagar – bíðar eftir frægari tíðum...

## Tjóðskaparmálið bíðar so eftir frægari tíðum

# Sligið klikk í Hoydølum...

Fyrr vóru tað næmingarnir í Hoydølum, sum gjørdu uppreistur. Nú er tað leiðslan, sum vísir rebelskan hugburð.



Uttan iva hevur Mikkjal Helmsdal, rektari, ein trupulleika við parkeringini.

Men í vanligum oyrum ljóðar tað beinleiðis klikkað, at ein næmingur verður burturvístur, tí at hann hevur brotið lokalu parkeringsreglarnar hjá skúlanum.

Parkeringstrupulleikarnir eru ikki nýggir. Teir vóru eisini fyri 10 árum síðani, fyri 20 árum síðani og fyri 30 árum síðani. Skúlans leiðsla hevur javnan gjørt vart við hetta, men tað er tosað fyri deyvum oyrum, tí einki – absolutt einki – er gjørt við trupulleikan yvirhøvur. Parkeringsviðurskiftini eru tey somu, sum tey vóru, tá skúlin varð bygdur í sekstiárunum.

Mikkjal Helmsdal hevur bara flutt trupulleikan niðan til grannarnar omanfyri. Har parkera næmingar, mangan skilaleyst, við Føroya mest trafikeraða veg. Næmingarnir skulu tvørtur um vegin, har 8.310 bilar sambært Landsverki koyra dagliga.

Økið kring Studentaskúlan er ríkiliga stórt, og eingin trupulleiki er at gera eitt fyribilsparkeringspláss á fløtuni, sum kann takast burtur í 2015, tá skúlin flytir. Men har er bara eingin vilji til at gera nakað.

Tápuligar avgerðir, ella vantandi avgerðir, kunnu sjálvandi fáa býttar avleiðingar. Hetta málið er eitt skúladømi uppá, hvussu býttisliga ein skúlaleiðsla, eitt mentamálaráð, eitt býráð og eitt Landsverk - sum ikki duga at tosa saman, loysa ein trupulleika.

Onkur má for ólukkan sláa nevan í borðið...

# Kiwanis lykil til sinnisveik

Hjálparfelagsskapurin Kiwanis skipar í mai mánaði undir eitt tiltak at stuðla sinnisveikum í Føroyum.

Seldir verða lyiklar, sum kunnu brúkast sum húslykil, verða teir skornir til hjá fyritøkum, sum gera úthurðslyklar.

Kiwanis sóknast í hesum sambandi eftir fólki, sum vilja hjálpa at selja lyklarnar – tað kann verða alt frá ítróttarfeløgum til pensjónstafeløg, ella onnur, sum vilja hjálpa. Fyri høvnn lykil verða goldnar 15 krónur.

Áhugað kunnu venda sær til vi-ei@olivant.fo ella ringja á 226008 ella 219399. Eisini ber til at senda umsókn til Eirik Ingvarsson, Norðskálavegur 36, 460 Norðskála.





## Vel meg tú sleppur undan MVG

SJÚRÐUR SKAALE
KJAK Á SÍÐU 17



## Silo: Føroya salt

HELGI EIDESGAARD OG HANS KOLS MORTENSEN
KJAK Á SÍÐU 10

# Tað er sjálvmál at Gunvá ikki er við

Fólkaflokkurin í Norðoyggjum fær uttan iva trupulleikar við at fylla stóra holið eftir stóra atkvøðuslúkin, Anfinn Kallsberg, sum ikki stillar uppaftur til næsta løgtingsval. Og tað sær út til at líkjast einum sjálvmáli, at flokkurin ikki stillar Gunvá við Keldu, borgarstjóra, upp. Sjálv sigur hon, at starvið sum borgarstjóri er so krevjandi, men hetta kann í besta lagið vera ein vánalig umbering.

Politikkur snýr seg um at fáa ávirkan, og vilt tú hava ávirkan, so stillar tú tey fólkini upp, sum kunnu roknast við at fáa flestar atkvøður. Gunvá við Keldu er ein teirra.

Og er borgarstjórastarvið veruliga so krevjandi, so kann hon leggja løgtingssessin frá sær eina tíð. Hvør maður hevði ikki gjørt tað? Eingin sigur, at hon er borgarstjóri, tá næsta ár er farið, tí tá hevur verið kommunuval.

Ikki takstiskt – og politiskt ókorrekt – at ein sterk kvinna í einum hóttum flokki ikki er á listanum. Spurningurin er so, um talan er um eina *ovvarna* kvinnu, ella hetta er floksins vilji...?



Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*